## Breyt bilin hjá mammu síni

Ein 14 ára gamal drongur varð tikin av løgregluni um vikuskiftið. Hann hevði eftir øllum at døma tikið bilin hjá foreldrum sínum, og farin ein biltúr. Foreldrini meldaðu bilin stolnan, og tá løgreglan kom fram á bilin var motorurin brendur saman og eitt dekk var eisini brostið. Av tí, at drongurin er undir revsialdur er málið latið sosialu myndugleikunum. Helst fer hesin drongur ikki at koyra bil aftur enn.



## Lítið rukkulív um vikuskiftið

Løgreglan greiðir frá, at tað ikki var so nógv fólk í býnum um vikuskiftið. Hetta merkir, at øgiliga fá mál vóru í býnum, men nøkur vóru tó. Tveir mans vóru koyrdi heim, tí teir lógu og svóvu á vegnum. Eisini var eitt herverk á einum skonkistaðið í Havn, har ein hurð var sparkað og brotin. Eitt líknandi mál var í einum bygningi hjá kommununi, har ein rútur var brotin. Herverk varð eisini gjørt á ein bil í Havnini, har bilurin var illa skøvaður. Umframt hetta vóru tveir førarar á sokallaðum motorcross súkklum meldaðir fyri at gera ófrið, men hesir megnaðu báðir at finna eitt skot at koyra í gjøgnum, so løgreglan ikki fekk fatur á førarunum báðum. Vakthavandi leggur afturat, at onki mál var í samband við tónleikatiltakið, GBOB, og hann metir ørsøkina til tað vera, at teir vóru á staðnum.

# Sjúkrahús upp í fyrstu deild

**Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður, fer nú at leita eftir einum nýggjum stjóra fyri øllum heilsuverkinum, sum fær víttgangandi heimildir og sum verður omanfyri leiðslurnar á teimum trimum sjúkrahúsunum**

HEILSUVERKIÐ

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Ein spurningur, sum nýggi stjórin fyri øll tey trý sjúkrahúsini skal viðgera, er, um tað er rætt at hava eina trýstreingjaða leiðslu á teimum trimum sjúkrahúsunum. Í hesum sambandi kann talan verða um at broyta leiðslubygnaðin á teimum trimum sjúkrahúsunum*

Nú fer Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í heilsumálum at eitt týðandi stig fram ímóti at loysa stórar og grundleggjandi trupulleikar í okkara heilsuverkið.

Hóast Hans Pauli Strøm sigur, at hóast vit hava eitt sera gott heilsuverk, eru eisini stórir trupulleikar, sum mugu loysast.

Og fyri at loysa teir, fer hann nú at leita eftir einum yvirskipaðum stjóra fyri alt heilsuverkið.

Hetta verður ein nýggjur stjóri, sum verður omanfyri leiðslurnar á teimum trimum sjúkrahúsunum.

- Uppgávan hjá honum verður at fyriskipa virksemið á øllum trimum sjúkrahúsunum. Hann skal eisini samskipa virksemið ímillum tey trý sjúkrahúsinum, so at peningaliga, tøkniliga og menniskjansliga tilfeingið í heilsuverkinum verður gagnnýtt á besta hátt.

Landsstýrismaðurin í heilsumálum staðfestir, at sum støðan er nú, hava vit eina leiðslu á Landssjúkrahúsinum og eina leiðslu á hvørjum av teimum trimum smærru sjúkrahúsunum, har hvør ræður sær og sínum.

- Avleiðingin av tí, er, at samskipanin er alt ov vánalig og endamálið við tí nýggja forstjóranum verður at tryggja, at vit hava eitt samanhangandi og samvirkandi heilsuverk við tøttum samstarvi ímillum tey trý sjúkrahúsini.

### Leiðslurnar missa makt

Hetta merkir ikki, at leiðslurnar á teimum trimum sjúkrahúsunum verða avsagdar.

- Men tað skerst ikki burtur, at tær koma av missa nakað av myndugleika og noyðast at geva seg undir eina felags, yvirskipaðari leiðslu.

Sum heilsuverkið er bygt upp nú, hevur hvørt sjúkrahús eina trýstreingjaða leiðslu við einum fyrisitingarligum stjóra sum hevur evstu ábyrgd mótvegis politiska myndugleikanum, men síðani eru eisini ein læknastjóri og ein røktarfakligur stjóri á jøvnum føti í ovastu leiðsluni.

Hetta er ein leiðslubygnaður, sum hevur kostað morð og brand at skipa á sjúkrahúsunum, tí sjúkraróktarfrøðingarnir settu sum ófrávíkiligt krav, at ein røktarfakligur stjóri skuldi setast á jøvnum føti við tann læknafakliga stjóran.

Hans Pauli Strøm leggur dent á, at nýggja yvirskipaða leiðslan fyri heilsuverkið skal eisini viðgera spurningin um bygnaðurin á teimum trimum sjúkrahúsunum, við eini trýstreingjaðari leiðslu, er tann mest skynsami mátin at reka eitt sjúkrahús eftir.

Hann leggur dent á, at tað verður tann nýggja yvirskipaða leiðslan, sum fer at taka avgerð um hetta á einum fakligum og fyrisitingarligum støði og hetta fer hann, sum politikari, ikki at leggja seg út í.

Men hann sigur, at í hesum sambandi kann talan vera um at heilt at broyta bygnaðin á teimum trimum sjúkrahúsunum.

- Men talan kann eisini vera um at varðveita eina trýstreingjaða leiðslu, men at laga hana til og at geva tí fyrisitingarliga stjóranum størri myndugleika og at geva læknafrøðiliga og sjúkrarøktarfrøðiligu leiðsluni ein meiri ráðgevandi leiklut.

## Vil skapa røttu fortreytirnar

Hans Pauli Strøm staðfestir, at sum heild hava vit eitt sera gott heilsuverk.

Men hann staðfestir samstundis, at heilsuverkið hevur stórar og grundleggjandi trupulleikar, sum tað er neyðugt at fáa bilbukt við.

- Føroyingar hava krav upp á eitt heilsuverk í fyrstu deild og sum kann samanberast við tey bestu heilsuverkini í londunum rundanum okkum og onki minni enn tað, kann góðtakast, leggur hann afturat.

Men hann sigur, at skal tað eydnast, er tað ein fortreyt, at hvør króna, sum heilsuverkið fær í játtan, verður gagnnýtt á allarbesta hátt.

Tað er eisini ein fortreyt, at tey trý sjúkrahúsini samvirka sum ein eind.

Tað er somuleiðis ein fortreyt, at politiski myndugleikin skilir at tað er neyðugt at heilsuverkið fær eina nøktandi játtan.

Men tað er sanniliga eisini ein fortreyt, at heilsuverkið viðurkennir tað játtan, sum tað fær at húsast við og heldur seg innanfyri teir givnu karmarnar.

- Alt hetta reisir spurningin um bygnaðurin í heilsuverkinum er tann best gagnligi, bæði viðvíkjandi leiðslubygnaðinum á hvørjum einstøkum sjúkrahúsi, men eisini við tvørgangandi samstarvi ímillum sjúkrahúsini.

Og fyri at røkka hesum endamáli, fer Hans Pauli Strøm nú at seta ein yvirskipaðan stjóra fyri øll tey trý sjúkrahúsini.